


# Kunning í samband við útferð hjá 3. flokki tann 8. juni 2021

So er tíðin komin til, at vit í 3. flokki á skúlanum við Løgmannabreyt fara okkara árligu floksútferð uttan fyri Havnina.

Týsdagin tann **8. juni 2021** fara vit saman við starvsfólkum frá frítíðarskúlanum til **Tjørnuvíkar**. Vit fara avstað sama, hvussu veðrið er ☺

Vit **møta sum vanligt** í skúlanum kl. 8. Bussurin fer frá skúlanum við Løgmannabreyt kl. 8.15. Um tað er onkur, sum longu veit, at tað ikki liggur fyri at koma við nevnda dagin, vilja vit fegin fáa tað at vita sum skjótast, tí tað kann vera avgerðandi fyri, hvussu stóran buss vit skulu hava.

Í **Tjørnuvík** fara vit at hugna okkum. Vit fara at ganga runt í bygdini, spæla í ánni og á sandinum og annars spæla ymisk spøl. Vit hava leigað bygdarhúsið, so vit kunnu vera inni, um veðrið ikki verður til vildar.

Av tí vit fara at hava ein langan dag, er tað umráðandi, at øll hava ein góðan og stóran **matpakka** við, umframt ein vatndunk. Frítíðarskúlin skipar fyri, at børnini fáa millummála í Tjørnuvík.

Sum nevnt omanfyri so fara vit at spæla í ánni og á sandinum, tí er tað umráðandi, at børnini hava **skiftiklæðir og handklæði** við. Vit vilja mæla tykkum til at leggja skiftiklæðini í plastposar, so alt ikki verður vátt og skitið.

Vit vera aftur á skúlanum á Løgmannabreyt umleið kl. **16.00.** Tá eru foreldrini vælkomin at **avheinta børnini** eftir ein langan og vónadi góðan og stuttligan dag.

Vit gleða okkum at fara ein øðrvísi túr við tykkara børnum.

Vinarliga

Toymið í 3. flokki og starvsfólkini í frítíðarskúlanum



